# SPYRST SO LIVST

RIGMOR DAM

Tríbarnamamma, kona, lærari, journalistur og redaktørur á lívsstílsblaðnum *Rákið* svarar spurningum til brævkassan **SPYRST SO LIVST**



*Redaktiónin loyvir sær at velja og vraka millum innsendu spurningarnar*

Hevur tú brúk fyri einum góðum ráði, so send spurningin til:
Sosialurin
SPYRST SO LIVST
postboks 76
FO-100 Tórshavn
**ella teldupost til rigmor@sosialurin.fo**

## Systir mín hevur verið ótrúgv

**Góða Rigmor**

*Systir mín býr í Danmark. Hon er 44 ár, eigur trý børn og hevur verið gift við manninum í 17 ár. Nú havi eg uppdagað, at hon hevur verið ótrúgv við einum av "pleygarunum", sum tóku sær av pápa okkara, tá hann lá til tað síðsta. Systir mín sigur sjálv, at hon hevði brúk fyri onkrum, sum klemmaði seg, tá maðurin ikki eingongd spurdi hana, hvussu hon hevði tað, tá pápi hennara lá fyri deyðanum.*

*Eg trúgvi, at hetta er ein reaktión uppá sorg og forvirring. Men eg veit ikki, hvat eg skal gera. Haldi, at maður hennara átti at fingið hetta at vita, men tað vil hon ikki. Hon hevur onki samband við "pleygaran" longur sigur hon.*

***Heilsan ein systir***

**Góða systir**

Eg rokni eisini við, at systir tín í sorgini hevur verið eitt lætt offur hjá hesum (óprofessionella) pleygaranum. Ikki minst, um hon hevur verið kensluliga forsømd av manninum. Spurningurin er, um tað er hon ella maðurin, sum hevur forbrotið seg mest: Hon, sum søkti sær tryggleika í einum heitum favni, ella maðurin, sum sveik, tá ið á stóð. Tí haldi eg ikki, at hennara ótrúskapur, sum tú rópar tað, veruliga er tað, sum vit rópa ótrúskap. Í øllum førum hevur maðurin eisini svikið so dyggiliga.

At tey bæði ikki duga at vera ordilig við hvønn annan er sum so ikki tín trupulleiki. Og maðurin fær onki burtur úr, at tú fortelur honum, at konan fann sær troyst hjá einum øðrum í neyðini. Lat tey um tað.

***v. rigmor***

## Vinmaðurin drekkur

**Hey Rigmor**

*Eg havi ein góðan vinmann, sum eg stúri eitt sindur fyri. Vit plaga at hugna okkum saman og fara í býin, men eg havi illgruna um, at hann drekkur meira enn gott er. Eg haldi, at hann eisini smakkar sær á gjøgnum vikuna, og tað er komið fyri, at hann ikki er til arbeiðis mánadag, tí hann er "sjúkur". Hvat heldur tú, at eg skal gera? Skal eg konfrontera hann við mín illgruna og kanska seta okkara vinarlag upp á spæl? Ella skal eg heldur tiga?*

***Heilsan vinurin***

**Góði vinur**

Hatta er ein góður spurningur. Tí óivað eru fleiri við tær, sum dragast við sama trupulleika: Nær skulu vit blanda okkum upp í, tá vit hava illgruna um, at ein av okkara kæru møguliga hevur ein rúsdrekkatrupulleika. Eitt gott orðafelli, sum verður brúkt í grannalondunum er, at vit skulu agera í staðin fyri at acceptera. Í útgangsstøðinum haldi eg, at tú skalt vísa umsorgan fyri tínum góða vinmanni og fortelja honum um tín illgruna. Hann má sjálvandi sjálvur velja, um hann fer í viðgerð, men ger honum greitt, at tú stuðlar honum, um hann velur tað. Í einum røttum vinarlagi eiga vit at vilja hvørjum øðrum tað besta, og tú svíkur tín vin, um tú ikki ger títt til, at hann kann fáa eitt betri og ruddiligari lív. Hetta er eisini galdandi fyri arbeiðsgevarar og onnur, sum eiga at hava umsorgan fyri øðrum.

Tá tað er sagt, er tað eisini umráðandi, at tú setir teg í samband við onkran professionellan, sum kann ráðgeva teg, áðrenn tú tekur málið upp. Bæði, so tú ikki setir vinarlagið upp á spæl, og so tú ikki verður drigin inn í hansara misnýtslulívsstíl. Tað eru fleiri, sum bjóða ráðgeving innan rúsdrekkamisnýtslu, eitt nú Heilbrigdið, Blái Krossur, Erna S. Hákunardóttir, sum er alkohol- og familjuráðgevi og ráðgevingarstovan Brúgvin, sum Carl A. Arge rekur.

***v. rigmor***

## X-damur á Facebook

**Góða Rigmor**

*Maður mín hevur profil á Facebook, og millum vinirnar eru onkrar gamlar damur, sum hann hevur havt. Eg veit, at hann eisini prátar við tær á Facebook. Mær dámar hetta einki, men er í grundini nakað galið við, at hann hevur samband við tær? Skal eg royna at seta mark fyri, hvat hann ger á Facebook?*

***Vinaliga daman***

**Hey »daman«**

Ja, er tað í grundini nakað galið við, at hann hevur samband við tær? Hann hevur jú einaferð valt tær frá og teg til.

Í hesum Facebook-tíðum er tað so lætt at koma í samband við gamlar vinir og onnur fólk. Hetta merkir ikki, at maðurin svíkir teg. Men vandin er sjálvandi størri, og allar kanningar vísa, at alt fleiri fólk finna saman umvegis netið. Kanska setir tað uppaftur størri krøv til, at vit hjúkla um parlagið, tí tað er so nógv lættari at koma í samband við aðrar møguligar partnarar.

Eg haldi, at tú eigur at hava álit á manninum, so leingi hann ikki hevur misnýtt títt álit. Hann kann lættliga fáa klaustrofobi, um tú alla tíðina hevur eftirlit við honum og hansara internetvanum. Vísir tú størsinni, ert tú eisini eitt stórt menniskja, men ert tú smálig, ert tú eitt lítið menniskja. Tímur tú tað?

***v. rigmor***

# Millum beinini

Málstrikan – MÁLFELAGIÐ

Frá einum andbráðum og óttaleysum býráðspolitikara citerar Sosialurin, at hann »ætlar ikki at stinga halan í sekkin«.

Tað er sjálvsagt alla æru vert at vísa dirvi og støðufesti. Men hevði tað ikki eisini verið klæðiligari at havt sínar orðamyndir í ordan? Vit kenna orðafellið 'stinga halan millum beinini' frá hundalívinum. Tá ið okkara ferføtti blívur bangin, stingur hann halan millum beinini og tekur til beins. Hann hevur jú fýra, so tað kann ganga skjótt. Hetta hundabiologiska fenomen hevur so ríkað mannaverðina við metaforinum 'stinga halan millum beinini' við týdninginum 'blíva bangin, taka til rýmingar, vísa ódjarvan atburð'. Hin máliskan, 'stinga í sekkin', hevur eitt heilt annað innihald. Her man talan vera um koyggjusekkin. Ein fiskimaður í slupptíðini fær tey ringu boð, at hann skal í land; hann verður koyrdur av, og tí má hann stinga tað sindrið, hann hevur í koyggjuni, í sekkin, koyggjusekkin, og stíga tey tungu spor upp gjøgnum leytaran, aftur eftir dekkinum, niður í bátin – og so í land. Hví hann verður koyrdur av skipinum, vita vit ikki; orsøkirnar kunnu vera so nógvar; ósemja, samanstoytur, illa í øgn við skiparan, ella tað bara hevur verið psykiskt óúthaldiligt at vera í lugarinum...

Kanska skuldi ein politikari, sum hevur tað for strævið í tí politiska, heldur stungið í sekkin, farið í land og fingið sær okkurt annað at takast við. Eingin veljari hevði sagt, at hann nú hevði stungið halan millum beinini, tí veljarar eru eisini fólk, og tey flestu duga at forstanda psykiskt trýst og unna einum troyttum politikara svalandi hvíld langt burturi frá politiskum kegli og brigsli. At síggja vandan nærkast og handla í tøkum tíma er kanska ein spurningur um at hava nakað millum oyruni.

(SJ)